**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!
Telefon 11820 · Telefax 14720

tíðindablaðið
sosialurin

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 11820 · Telefax 14720

## veðrið

Lágtrýstið eystanfyri Kappan stendur mestsum í stað. Tilhoyrandi brúgvalegini yvir Íslandi og havleiðunum sunnanfyri, reka eystur-yvir og elva eitt skifti til lýtt luftrák móti Føroyum. Hósdagin mennist eitt hátrýst yvir Eysturgrønlandi og elvir sum fráliður aftur til kølið luftrák norðan eftir móti Føroyum.

**Týsdagin**




Lítið lot upp í friskt lot, upp í 10 m/s, av vestri og útsynningi, ódrigið og tám, kanska eisini drív og mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Mikudagin**

At byrja við lot upp í friskt lot, 5-10 m/s, av vestri, tám, ælingur og vanaligt sýni, út á seinnapartin lot norðaneftir, minni avfall og betri sýni. Hitin um dagin uml. 10 stig, um náttina niður í 7 stig.

**Hósdagin, fríggjadagin og leygardagin**

Einamest lot upp í friskt lot, helst undir 10 m/s, av útnyrðingi og norði, tøluliga ella gott sýni og eisini sólarglottar, to okkurt æli. Mesti hiti uml. 10 stig, um náttina niður í 5 stig, í støðum kaldari.

## óli teknar

© 1993 Sosialurin / Óli Petersen

*John Bull á føroyaleiðini*




**Eingilskmaðurin er sjálvboðin farin at gera oljukanningar í føroyskum sjóøki**

*Norðurlandahúsið*

# Seinasta Føroya-kvøldið í ár

I kvøld, 31. aug. verður so tað seinasta Føroyakvøldið í ár.

Kl. 18.00 verður tað kalda borðið, við fiski frá Føroya Fiskasølu.

Kl. 19.30 verður kvøldsetan, og sær skráin fyri kvøldsetuna soleiðis út:

Ljósmyndarøðin »Havlendið«, sum teir báðir Ingi Joensen og Jóhannus á Rógvu Joensen hava gjørt.

Jazztrio við Rógva á Rógvu, trummur, Magnus Johannesen, keyboard og Edvard N. Debes, bass. Hesir spæla tónleik, teir sjálvir hava gjørt.

»Soleiðis byggjast torn« – ein dramatisering av yrkingum hjá Jóannesi Nielsen – er úr nýggjastu yrkingum hansara «Kirkjurnar á Havsins Botni«. Sjónleikararnir eru Katarina Nolsøe, Hanus Tórgarð og Rosa á Rógvu Joensen.

Ljósmyndarøðin »Bláur Bóltur«, sum Ingi Joensen og Jóhannus á Rógvu Joensen hava gjørt.

Gentukórið »Cantabile« undir leiðslu av Paula í Sandagerði.

Dansifelagið í Havn endar kvøldið við føroyskum dansi.

Atgongumerki eru at fáa í húsinum og er kostnaðurin fyri matin og kvøldsetuna kr. 200. Tú kanst eisini einans keypa atgongumerki til kvøldsetuna, og kostar hetta kr. 60.




NÝGGJA VIDEOBANDIÐ VIÐ FØROYA-MYNDUM
fæst í heil- og smásølu í:
TOP SHOP
SMS
TLF. 16838 - Fax 16965

*Glasfípur*
vatnbrunnar
og
septictangar
Best og bíligast frá
AQUA PLAST
á Signabø - Tlf. 21303

## Vestfalskyrrindi

24. august: Fyrra kvarter
1. september: Fullmáni
3. september: Mánin longst frá jørðini

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. aug. | 0657 | 1917 | 0857 | 2117 | 0512 | 1732 | 0712 | 1932 | 0557 | 1817 | 0612 | 1832 |
| 1. sept. | 0738 | 1958 | 0938 | 2158 | 0553 | 1813 | 0753 | 2013 | 0638 | 1858 | 0653 | 1913 |